# Rýtmiskur gospel í kirkjuni

**Í næstu viku fer rútmiskur gospeltónleikur at runga í Christianskirkjuni í Klaksvík og Vesturkirkjuni í Havn. Gentofte Gospelkor, sum hevur føroysku Lindu Holmberg Andrews sum hjálpardirigent, kemur til Føroya at hava tvær framførslur**

KONSERT
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Tann 8. mai klokkan 20 fer Gentofte Gospelkor at luttaka á einari ungdómsgudstænastu í Christianskirkjuni í Klaksvík. Klokkan 20 dagin eftir hevur kórið konsert í Vesturkirkjuni.

Linda Holmberg Andrews er hjálparkórleiðari hjá Gentofte Gospelkor. Linda hevur millum annað sungið við í "Vit kunngera Jesus" og "Mær halda Harrans hendur".

Linda býr í Danmark, og hon livir av at syngja og undirvísa í sangi. Hon hevur fýra kór, og so fæst hon eisini við ymisk tónleikaverkstøð, har hon undirvísir solistum. Eisini syngur hon sum "backuppvoice" til ymiskar fløgur og sjónvarpssendingar.

Linda sigur, at kórið er eitt luthersk kór, sum hoyrir til Gentofte kirkju. Tey syngja rútmiskan gospel, har ið serligur dentur verður lagdur á gleðina og frælsi við at syngja gospel.

- Um tit møta upp til konsertinar hjá okkum, so er tað ein vandi fyri, at tit fara glað avstað aftur, sigur Linda skemtandi.

Kórið steðgar heilt stutt í Føroyum, men tey skulu uppliva nógv. Mánadagin skulu tey royna at dansa føroyskan dans, týsdagin skulu tey vera við í "Góðan morgun Føroyar", og tey skulu eisini ein túr til Gjáar at njóta náttúruna.

- Tey suffaðu øll, tá ið eg fortaldi teimum, hvussu nógv vers eru í einum kvæði, sigur Linda.

Tað verða 80 fólk við í ferðalagnum, harav 55 eru sangarar. Miðalaldurin á kórinum er umleið 40 ár, og aldurspennið er frá 16 – 70 ár, so hetta er eitt fjølbroytt kór.

- Vit venja fast einaferð um vikuna. Øll eru sera spent og møta væl upp. Vit eru bara nakrir glaðir amatørar, men kórið verður rikið rættiliga proffesionelt. Vit gleða okkum øll til Føroyaferðina, sigur Linda Holmberg Andrews.

# Jón Tyril deilir sína størstu konsertupplivng við føroyingar

**Í dag avdúkar G!, at ektaðaði amerikanski suðurstats ruts tónleika, gospel, blús og sól bólkurin Holmes Brothers luttekur á ársins G! Festivali, í hesum bólki hevur fyriskiparin Jón Tyril tryggja sær, sambært honum ein av heimsins bestu konsertbólkum**

FESTIVAL SUMMARIÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

"Holmes Brothers havi eg hoyrt tríggjar ferðir. Fyrstu ferð í Norðurlandahúsinum á Jazzfestivali, eg haldi, tað man hava verið í 91. Síðani hoyrdi eg teir á lítlu barrini Børsen í Svendborg í januar 93 og á Nibe Festival í 2003, tá Gestir vóru og spældu har. Holmes Brothers eru gamlir svartir stabbar, sum spæla ektaðan amerikanskan suðurstats roots tónleik - gospel, blues og soul í eini imponerandi vælvirkandi blanding. Allar konsertirnar við teimum hava verið fantastiskar og upplyftandi, men eg haldi tann á Børsen ber prísin, sikkurt tí at eg sat allar fremst, so tætt at sangarin og gittarleikarin kundi havt smekka gittarin í høvdið á mær fleiri ferð, um hann ikki ansaði sær. Holmes Brothers live er stutt sagt lívsjáttandi og uppbyggjandi.", soleiðis segði Jón Tyril, tá planet. fo bað hann velja fimm tær bestu konsertupplivingarnar, ið hann hevði havt. Nú hevur hann tryggja sær Holmes Brothers á G!.

Bólkurin var stovnaður í 1979 av Sherman Holmes á bassi, Wendell Holmes á ljómborði og gittara og Popsy Dixon á trummum, og síðan tá hevur bólkurin givið hópin av útgávum út, og spælt konsertir kring allan heim, eisini í so ymisk støð sum í Føroyum, á Tórshavnar Jazz-Fólka- og Bluesfestivali fyrst í 90'árunum og í Washington fyri fyrrverandi amerikanska forsetanum George Clinton.

Holmes Brothers hevur spælt saman við John Lee Hooker, Van Morrison, Peter Gabriel, Odetta, Phoebe Snow, Jungle Brothers og Joan Osbourne, sum sigur seg vera teirra størsta fjepp-ara.



Nýggjasta fløgan hjá Holmes Brothers Simple Truth hevur 13 løg, m.a. klassikarar hjá fólki sum Hank Williams, Willy Nelson og Bob Marley, men eisini teirra egnu løg. Í løtuni eru teir á konsertferð í sambandi við hesa fløgu, ið kemur aftan á teirra størstu fólkaligu hittfløgu Speakin In Tongues, ið kom út í 2001, og sum Joan Osbourne hevur framleitt. Henda fløga skaffaði bólkinum framførslur í stórum amerikanskum sjónvarpssendingum, sum t.d. hjá David Letterman.

# Nýggjur fíggjarmaður á Strandferðsluni

**Niels Juel Arge verður nýggjur fíggjarleiðari á Strandfaraskipum Landsins**

STARVSSETAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi, sum strandferðslustjórin hevur sent, verður sagt, at Niels Juel tekur við starvinum 1. juni, tá hann loysir Johnni Poulsen av. Hesin er er farin í starv sum fíggjarleiðari á P/F Føroya Shell.

Niels Juel Arge er 40 ára gamal, og er útbúgvin cand.merc.aud á Handilsskúlanum í Århus. Seinastu 3 árini hevur hann starvast sum fíggjarleiðari hjá P/F Poul Michelsen, og áðrenn hetta arbeiddi hann á Fíggjarmálaráðnum, Grannskoðaravirkinum SPEKT og í Føroya Banka.



# Fer at virka fyri størri gjøgnumskygni

KOYRIFRÁLÆRA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eftir at vit í Sosialinum í gjár avdúkaðu, at frá 1. mai í fjør til 30. apríl í ár var munurin á dumpiprosentunum í ástøðisroyndunum til koyrikort upp í 45% frá einum koyrilærara til annan, hóast prísurin, ið kundin rindar er tann sami, tykist gongd at vera komin í at loysa manglandi gjøgnumskygnið á økinum.

Úr Vinnumálaráðnum verður sagt, at tey ynskja, at brúkarin skal fáa so gott innlit, í tí veiting hann keypir, sum gjørligt. Tí fer Vinnumálaráðið í næstum, saman við Akstovuni, at taka upp spurningin um almenn dumpiprosent ella eina smileyskipan, sum tí, ið Benny Ejdesgaard koyrilærari skeyt upp í blaðnum í gjár.

Niels Winther, deildarstjóri í Vinnumálaráðnum sigur við Sosialin, at tað er ynskiligt, at hetta verður gjørt í samráð við koyrilærafelagið, og at skipanin er sjálvboðin. Tí verður hetta tikið upp á fundi við felagið í næstum.

Niels Winther metur ikki, at nakað hugskot er í, at tosa um, hvat gerast skal, um tað ikki eydnast at fáa koyrilærararnar við í skipanina. Tí hetta má støða takast til, um so er.

Niels Winther vísir á, at ein ávísur vandi er í at gera tølini almenn. Tí hetta kann fáa koyrilærarar at halda seg aftur frá at taka sokallaðar tungar næmingar inn, hetta eru fólk, ið av onkrari orsøk hava trupult við at klára royndina, og væntandi skulu brúka fleiri royndir, áðrenn tey fáa koyrikort. Hetta skal eisini hædd takast fyri í eini skipan, ið gevur størri innlit. Samstundis er Akstovan illa sperd, og tí eigur ein loysn at verða funnin, ið ikki krevur stóra umsitin, sigur Niels Winther.

Niels Peter Olsen úr Koyrilærarafelagnum sigur við Sosialin, at hetta mál ikki hevur verið umrøtt í hansara tíð í felagnum, men at tað verður tikið upp á næsta fundi, ið verður eina av komandi vikunum. Áðrenn hetta vil hann helst ikki gera nakra viðmerking til málið.